# Starvsvenjing í Havn

**Eg, sum sjálvur var í starvsvenjing á Sosialinum, var ein túr í Havnini og vitjaði nøkur vinfólk, sum eru í starvsvenjing ymsa staðni í býnum**

STARVSVENJING
*Hanus Huusgaard Eysturdal*

Eg var fyrst í Fragd & Fimi og spurdi tær báðar, Belindu Sigmundsdóttir Berg og Billu Jenny Jónleifsdóttur Joensen um, hvat ið tær gjørdu og hvussu teimum dámdu, o.s.fr.Teimum dáma sera væl at vera í starvsvenjing í Fragd & Fimi, og fólkini, ið arbeiða har eru eisini sera fitt. Tær taka m.a. ímóti peningi frá teimum, ið vitjandu og tey vaska maskinurnar, sum fólkini brúka. Tær trena eisini eitt sindur sjálvar. Eg spurdi tær eisini, um har vóru meira mannfólk enn konufólk. Belinda var tá skjótt at svara at her vóru meira mannfólk og at tey flestu konufólkini hildu til í Yndi. At enda søgdu tær at tær, við einum brosi, at tær fingu tikið sól fyri einki.



*Billa Jenny Jónleifsdóttir Joensen og Belinda Sigmundsdóttir Berg*



Síðani fór eg í SMS at fáa eina samrøðu við Miriam, sum var stødd í Bodyshop í starvsvenjing. Hetta dámdi henni sera væl. Hon sigur, at hon ger næstan alt tað sama, sum hinar í Bodyshop gera. Tað einasta hon ikki ger, er at standa við kassan. Hon setur m.a. vørur upp, sum eru komnar inn. Hetta er mest sápa, parfuma og sminka, men tó er jólapynt eisini byrjað at koma upp á hillarnar, og hesum stendur Miriam eisini fyri. Miriam sigur at enda, at síðst á degnum, støvar hon av. Hetta var ikki nakað, sum Miriam ætlar at fáast við, í framtíðini, men hetta er hóast alt, nakað hon fær gagn av.

At enda fór eg í Skansastovu at vita hvussu gekk hjá Alexander og Remi, sum vóru har í starvsvenjing. Tá ið eg kom innar, sótu teir báðir og spældu guittar. Teir vóru møttir upp eitt sindur áðrenn, teir skuldu, tí at tað var cool at jamma eina løtu, áðrenn teir byrjaðu starvsvenjingina sjálva.

Lagið var gott á teimum báðum, og teimum dámdu sera væl at vera har. Teir hava m.a. hjálpt við at undirvísa yngri næmingar í tónleiki, og teir hava eisini spælt sjálvir. Teir høvdu lisið nótar og vant, seg í øllum møguligum ljóðførum. Við endan siga teir, ímeðan teir flenna, at teir eisini at enda á degnum rudda eitt sindur upp í húsinum.

*Alexander Reynheim og Remi Kofoed*





Guðrun Ziska, er í starvsvenjing í bakarínum í Frants Restorff. Hettar er sera áhugavert, men eisini strævið tá ið hon skal møta klokkan 5.00 stundisliga hvønn morgum, men hon fær frí ímillum klokkan eitt og tvey, so tað er kanska ikki so galið kortini. Guðrun sigur at byrja við, við einum brosi, at hon hevur lært at bróta egg við einari hond. Hon ger fyri tað mesta køkur, bollar og ymiskt annað klárt til at blíva bakað. Hon hevur eisini bakað ymiskt sjálv. Guðrun hevur eisini prøvað at vaksa teir mongu, stóru ovnarar hjá Frants. Hetta er sera áhugavert at síggja hvussu alt gongur fyri seg, og eisini hvussu teir mongu bakararnir arbeiða frá tíðliga á morgni til middags. Strævið lív sigur hon at enda.

# Eitt spennandi

**Síðani 1999 hevur TenSing kórið, Sound of Glory, verið eitt virkið ungdómsarbeiðið her í Havnini. Tað var norski Vemund Svendsen, saman við KFUM og KFUK, ið tók fyrsta stigið at byrja eitt Tensing kór í Føroyum**

KÓR
*Birita W. Djurhuus*



Í 1998 kom norski Vemund Svendsen til Føroya at vitja saman við norska Tensing kórinum BB. Árið eftir var hann biðin um at koma til Føroya at byrja eitt líknandi kór her heima. Tað var KFUM og KFUK, ið hildu, at slíkt kór vantaði í Føroyum. Í byrjanini var undirtøkan ikki tann stóra, men sum tíðin gekk, fingu meira og meira áhuga fyri Tensing.

Meinhard Arge Jensen var ein av teimum fyrstu luttakarunum í kórinum, og summarið í 2000 kom Meinhard í nevnd, har hann sat líka til 2004, harav tvey ár sum formaður. Í 2004 var Meinhard eisini voluntørur fyri KFUM og KFUK saman við einum vinmanni úr Norra, Kristian Grepstad.

Tensingkórið verður fyrst og fremst stýrt av ungum í kórinum, og tað eru tey, ið fáa kórið upp at standa. Øll í kórinum hava ábyrgd av, at kórið mennist, við at koma við hugskotum og øðrum. Eisini eru ymiskar nevndir, ið allar hava sín leiklut í kórinum, figgjarnevnd, miðlanevnd, programmnevnd, legunevnd o.s.fr. At Tensing er eitt sjálvstøðugt kór, ið er bygt av nevndum og luttakarum merkir, at eingin ræður yvir øllum. Men 20 ára gamli Meinhard er tann, ið samlar teir leysu endarnar og leggur teimum ungu lag á. Sjálvur vil hann ikki kalla seg ein høvuðsleiðara, men eitt slag av vegleiðara, ið er har at tosa við og vegleiða tey ungu í kórinum, og hetta virkar sera væl, sigur Meinhard Arge Jensen úr Havn.

### Konsertir, tiltøk og uttanlandsferðir

Tey 6 árini Tensing hevur verið virkið kór, hava tey borðreitt við nógvum konsertum, tiltøkum og uttanlandsferðum millum ár og dag.

Um høgtíðirnar hevur Tensing skipað fyri ymiskum tiltøkum saman við KFUM og KFUK. Serliga á Ólavsøku í basarinum hjá KFUM fáa tey savnað felagnum nøkur oyru saman. Eisini hevur Tensing havt tvær fløsku innsamlingnar, ið eydnaðist sera væl.

Tensing syngur mangan til konfirmantafestir í KFUM ella KFUK. Eisini verður kórið mangan spurt, um tey kunnu syngja til ungdómsguðstænastur kring landið. Seinasta summar hevði Sound of Glory vitjan av tveimum vinarkórum úr Noregi, Bukkene Bruse og Hinna TenSing. Saman høvdu tey eina framúrskarandi konsert í Norðurlandahúsinum ið



*Christina hevur gingið til Tensing í 4 ár*